## Lassin dømir í Klaksvík

Lassin Isaksen skal døma stórdystin á Norðoyastevnu millum 1991-liðið hjá KÍ og dagsins KÍ-lið. Lassin Isaksen var í nógv ár ein av fremstu dómarunum her á landi. Hann var eisini FIFA-dómari í fleiri ár og dømdi millum annað altjóða a-landsdystir. Nú eru tvey ár liðin, síðani Lassin gavst at døma á hægsta stigi, men nú eru boð eftir honum aftur. Lassin skal nevniliga døma stórdystin á norðoyastevnu millum 91-liðið hjá KÍ og dagsins KÍ-lið. Lagt er upp til eitt brak millum gamlar hetjur og ungar leyvur – og spurningurin er so, hvør vinnur dystin. Dysturin tey bæði KÍ-liðini verður í Djúpumýri sunnudagin kl. 15.00.



## Marius skeyt seg til met

Tann 30. maj skipaði Sunda Byrsufelag fyri kapping í leirdúgvuskjóting. Skotið varð í skeet, og eydnaðist tað Marius Joensen at seta nýtt føroyskt met við 88 dúgvum av teimum 100, sum meddað var eftir. Honum á baki kom Jóannis Joensen við 83, meðan Sámal Debes gjørdist nummar trý við 80 dúgvum. Í A-bólkinum, har 75 dúgvur vórðu skotnar avstað, vann Magni Dam við 52 dúgvum. Alfred Joensen rakti 49 og Tummas Johannesen 46 dúgvur.

# Nú skal sterkasti føroy



### Greinarnar

**Hesar eru tær seks kappingargreinarnar, sum kappast verður í, tá Sterkasti maður í Føroyum verður á skránni tann 10. oktober**

**Lyfta 90 kg frá akslahædd og upp um høvd flestar møguligar ferðir**
**Halda einum 20 kg tungum dekki í strektum ørmum longst gjørligt**
**Max lyft í benchpress**
**Renna upp á tíð við 5 sekkum á 100 kilo hvør**
**Halda 2X100 kg bobbens upp frá í longst møguliga tíð**
**Lyfta reyvina á persónbili uppfrá og ganga 20 metrar skjótast gjørligt**

*Undirhaldsvirðið er høgt í sonevndu strong-man kappingunum. Ikki minst tí kappingarreiðskapurin ofta er slíkt, sum fólk eisini arbeiða við í gerandisdegnum*

*Savnsmynd*

**Tann 10. oktober í ár skal sterkasti maðurin í Føroyum finnast. Longu nú hava átta mans boðað frá luttøku í fyrstu strong-man kappingini í Føroyum í 10 ár**

STYRKI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinasta partin av 90'unum tóku styrkiskappingar av álvara dik á seg her á landi.

Ikki tí. Menn munnu ofta hava reypað um styrki. Hvussu tað var at lyfta høv av ymiskum slag, og hvussu raskir menn vóru at útinna bæði hetta og hatta bragdið.

Men tað mundi tó vera trupult at gera heilt av, hvørjir veruliga vóru teir sterkastu, áðrenn kappingin, sum tá æt Føroya sterkasti, varð fyriskipað.

Vinningurin ta ferðina var millum annað luttøka í kapping uttanlands, og tá føroyski vinnarin – Regin Vágadal – fyrst hevði gjørt vart við seg í Skotlandi, slapp hann av álvara við millum teir stóru dreingirnar. Enntá somikið væl, at tað eisini eydnaðist núverandi strandferðslustjóranum at skipa fyri síni egnu kapping, Atlantic Giant, sum varð hildin nakrar ferðir kring túsundáraskiftið.



*Ein av meira vanligu kappingargreinunum er benchpress*

*Savnsmynd*

### Taka táttin uppaftur

Ikki óvæntað var Regin Vágadal sterkasti føroyingurin tey árini, tá føroyska kappingin varð skipað, og kanska hevði til tíðir einaráðandi støða hansara sína ávirkan á, at áhugin fyri kappingini at enda var somikið lítil, at eingin orsøk var at halda hesa.

Og síðani Regin gavst við ítróttini, hevur millum lítið og einki verið at hoyrt um slíkar kappingar her í Føroyum. Hóast fleiri eru, sum miðvíst venja intensiva styrkivenjing, hava kappingarnar verið avmarkaðar til styrkilyft, sum kanska er nóg strævið í sjálvum sær, men sum tó ikki heilt er tað sama sum ofta áskoðaravinarligu strong-man kappingarnar.

- Vit eru fleiri, sum hava vant nógv, og vit hava ofta tosað um, at tað hevði verið stuttligt at fyriskipað veruligar kappingar innan styrki aftur, sigur Bogi Hammer, sum er ein av teimum, sum hevur tikið stig til at gera nýggja kapping um at finna Føroya sterkasta mann.

- Tað eru jú eisini nógvir, sum reypa sær av styrki, og nú kunnu vit veruliga fáa at